# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2018/19



## SPURDÓMUR: HVÍ VAR MARIA VALD AT VERÐA MAMMA AT JESUSI




Granskarar: bólkur 1 í Sands skúla

Sandra, Alda, Rebekka, Rúna, Sissal, Fróði, Lilja, Rógvi, Pætur, Dánjal, Magnus, Kristian Høgni, Jaspur, Jonhild, Rita og Martin

# INNGANGUR

Tað var eitt sindur ringt at fáa byrjan á, tá vit skuldu royna at finna fram til, hví Maria var vald at verða mamma Jesus. Men vit funnu tó fram til eina frágreiðing sum tíðin leið.

Vit hava lært, at tað ikki altíð er lætt at halda seg til evni.


Lærari: Lilian Clementsen og Kristian Højsted

lilian.clementsen@skulin.fo


Luttakarar:

Kristian Høgni og Jaspur úr 1.flokki

Fróði, Lilja, Rógvi, Jonhild og Rita úr 2.flokki

Alda og Pætur úr 3.flokki

Rebekka, Dánjal og Magnus úr 4.flokki

Sandra, Rúna, Sissal og Martin úr 5. flokki


Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

1. Vit velja spurdóm
2. Lív Mariu
3. Vitjan í Sands kirkju
4. Maria sum ung
5. Maria - søgan

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á, hví Maria var vald at verða mamma at Jesusi.



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit skriva nøkur uppskot til møguligar frágreiðingar. Slík uppskot verða nevnd hypotesur:

Hon var fitt

Gud var forelskaður í henni

Tí hon hevði hann í búkinum

Tí hon var kristin

Hon hjálpti øðrum

Henni dámdi djór

Hon bað til Guð

Hon vildi hava eitt barn



# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit ætla at leita á netinum.

Lesa eitt sindur í bíbliuni.

Hyggja í bøkur.

Og vit ætla eisini at spyrja prest og onnur fólk.





# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit hava leita á netinum, í bókum og í Bíbliuni.

Vit hava eisini verið og vitja prest. Vit sungu ein sang og lærdu, at menn og dreingir sleppa ikki at hava hattar og húgvur, meðan teir eru í kirkju.

Vit hava spurt onnur fólk um, hví tey halda, at Maria var vald at vera mamma Jesus.

Vit hava eisini gjørt nógv kreativt, sum t.d. at líma, tekna og at klippa.

Vit lærdu, hvussu Maria hevði tað, og at Maria var ótrúliga ung, tá hon fekk Jesus.








VIT HAVA VERIÐ OG SPURT
FÓLK HVAT TEY HALDA
Hví heldur tú at Maria var vald at vera
mamma Jesusi?
:svar
Tí hon var óskyldið og góð
Tí hon var tann fittasta gentan sum var
Hon var kristin og reinn og eitt gott fólk
Tí hon var so fitt

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til, at Maria var vald, tí hon hevði eitt reint hjarta. Og tí hon vildi gera tað, sum Guð bað hana. Hon var fitt og góð og hjálpti øðrum, og tað dámdi Guði.



# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit hava gjørt eina plakat, og vit fara at vísa foreldrum og familju, hvat vit hava gjørt.

(framløgur á foreldratiltaki)






# FYLGISKJØL

1.

Spurningar, sum øll børnini í skúlanum lótu inn í spurnarpostkassan, áðrenn arbeiðsdagarnir byrjaðu:

Vit valdu ein spurning og arbeiddu við honum í tveir skúladagar.



1 Hví hava vit jólatræ ?
2 Hví pyntar man jólatræ ?
3 Hví fáa vit jólagávur ?
4 Hví hongja vit hosu ?
5 Hví hava vit jólakalendara ?
6 Hví eitur tað jól ?
~~7 Hví var Maria vald at verða mamma at Jes~~
~~8 Nær og hví kom jólamaðurin ?~~
9 Hví er alt reytt á jólum ?
10 Hví kom stjørnan á himmalin ?
11 Er tað altíð kavi á jólum ?
12 Hví eta vit rísingreyt á jólum ?
13 Hvat er vanligasti jóladøgurðin ?
~~14 Hvar býr jólamaðurin ?~~

AT RÍÐA Á ASNA

Vit halda at Maria reið á asnabaki úr nasaret til betlahems nærum 110 kilometrar .á jesu døgum var oftast riðið á asna. Bæði rík og fátæk riðu á asna

OG HON ÁTTI SON SÍN HIN FYRSTAFØDDA, HON REIVAÐI HANN OG LEGÐI HANN Í EINA KRUBBU AV TÍ AT TAÐ IKKI VAR RÚM FYRI TEIMUN Í TILHALDSHÚSINUM



# Vitjan í Sands kirkju

Vit fóru í kirkuna at spyrja prestin nakrar spurningar.Vit fingu at vita, at Maria var rein og góð og skær.Maria var ein fitt genta, men hon var jødi, men hon trúði at Jesus var Kristus. Maria bað til Guð og hon vildi gera tað, sum Guð segði.









.

4.

Hetta er mamma Jesus, Maria eitur hon. Ein eingil kom til Mariu og segði at hon skuldi hava barn tá hon var 15 ella 16 tað var ræðuliga ringt fyri hana at hava Jesus tí hon var so ung. Hon skuldi hava Jesus við Jósef tað var torført



5.



Maria er mamma Jesus og Jósef er pápi jesus, men Guð er eisini pápi Jesus, men áðrenn Maria bleyv mamma Jesus, tá kom ein eingil til hana. Fyrst var hon bangin, men so segði eingilin: óttast ikki, tí eg eri Guds eingil, og eg beri gleðiboð, tí tú skal hava ein son. So segði Maria, men eg havi ongan mann, so segði eingilin, at tú skal ikki bara hava ein vanligan son, men ein kongason og han skal eita Jesus. Nú fara vit at hoyra, hvat eingilin sigur við Jósef. Eina ferð tá Jósef lá og svav, kom ein eingil til hann og segði, Jósef tú skal fara til Nasaret eftir Mariu, tú skal verja hana, og tú skal ikki vera bangin fyri at gifta teg við henni. Tá ið Jósef vaknaði, fór hann út í fjósið eftir asnanum og fór til Nasaret eftir Mariu, so fóru tey til Betlahem.

Skriva hava Lilja og Alda